## DAGSINS MEINING

# Klossut

Landið er nú blakað út í eitt verkfall, sum bæði kann gerast drúgvt og lemjandi. Drúgvt, tí Føroya Arbeiðarafelag (FA) og Havnar Arbeiðskvinnufelag (HAK) góðtaka ikki lønarhækkingina, sum arbeiðsmannafeløgini í Havn og arbeiðskvinnufelagið í Klaksvík fingu, og Føroya Arbeiðsgevarafelag kann neyvan lata FA og HAK meiri latið varð hinum feløgunum - ikki í bræði í hvussu er.

Lemjandi, tí verkfallið rakar nógv virksemi, sum hevur stóran samfelagsligan týdning: fólka- og farmaflutning, fiskaarbeiðið kring landið, mjólkaflutning, og eisini fer verkfallið kanska at darva flogferðsluni.

Arbeiðsmannafeløgini í Havn og í Klaksvík og arbeiðskvinnufelagið í Klaksvík góðtóku eina lønarhækking, sum er á somu støðd sum feløgini á tí almenna arbeiðsmarknaðinum fingu. Harafturat fingu feløgini nakrar viðbøtur, eins og gjaldið til eftirlønina hækkar. Tað fegnaðist formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag sjálvandi um.

Men formaðurin í FA hevur rætt í tí, at sama lønarhækking í prosentum, sum feløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum fingu, økir lønarmunin, tí at lønarlagið hjá teimum tímaløntu er lægri. Tí vil FA og HAK hava fleiri krónur omaná. Keypiorkan er eisini fallin nógv seinastu tvey árini. Harafturat vilja hesi feløgini hava eina skipan, so fólk fáa løn alt eftir, hvussu leingi tey hava arbeitt, sum er vanligt á almenna arbeiðsmarknaðinum og aðrastaðni.

Ein lønarhækking og eitt verkfall, sum Føroya land kundi verið sloppið øðrvísi frá, um landsins stýri hevði slóðað fyri, at reallønin hjá løntakarum vaks. Tað kundi verið gjørt við lægri skatti generelt, og við t.d. at lækka meirivirðisgjaldið á ávísum vørum, og lækka ella tikið av oljugjaldið, sum andstøðan skeyt upp. Landskassin hevur ráð til tað uttan at búskapurin verður hitaður ov nógv upp.

Um vanligi løntakarin hevði meiri til taks í tí dagliga, høvdu lønarkrøvini neyvan verið so stór. Nú hava vit eitt verkfal, og vit hava fingið eina lønarhækking, sum elvir til prísvøkstur og verri kappingarføri. Hett varð formaðurin í arbeiðsgevarafelagnum eisini endurgivin fyri at siga við útvarpið ígjár. Men hví hevur hann ikki áður roynt at tæða tað politiska baklandið fyri hesi áskoðan?

Enn kenna vit ikki avleiðingarnar frá verkfallinum, men tað má ásannast, at landsstýrið hevur einaferð afturat borið seg klossut at í samband við lønarlag, prísgongd og kappingarføri í føroyska samfelagnum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skúlastýrisvalið og páparnir

Javnstøðunevndin hevur fingið fleiri fyrispurningar og áheitanir frá foreldrum í samband við skrivið, sum sent er til búðstaðinar hjá skúlabørnum, nú skúlaráð skulu veljast. Foreldur, og serliga pápar, øtast um, at teir ikki hava valrætt ella kunnu veljast til skúlaráðini, sum eru ætlað sum ein demokratisering innan skúlaverkið. Sambært skrivinum frá Undirvísingar- og heilsumálastýrinum hava bert foreldur, sum hava foreldrarætt til børn síni, valrætt og valbari til skúlaráðini.

Í Føroyum verður í dag sambært upplýsingum frá hagstovuni nærum annaðhvørt barn føtt uttanfyri hjúnalag. Summi av foreldrunum giftast seinni og talið minkar nakað. Hinvegin so minkar talið av hinari helvtin av børnum, sum fødd eru innanfyri hjúnalag eisini, tá foreldur separerast ella skiljast. Ongi hagtøl eru tøk um, hvussu nógv børn eru, sum í dag hava bert eitt foreldur við foreldramyndugleika.

Soleiðis sum reglurnar um foreldramyndugleika eru í Føroyum í dag, so er tað bert innan hjúnalagið at bæði foreldrini hava foreldramyndugleika. Tann ógifta mamman fær altíð einsamøll foreldrarættin til tað fødda barnið. Pápin fær bert lut í hesum um hann giftist mammuni. Við hjúnaskilnað fáa antin mamman ella pápin foreldrarætt. Enn er tað í flestu førum mamman sum fær foreldrarættin við hjúnaskilnað, ofta eisini tí at pápin ikki krevur foreldrarættin. Út frá hesum má roknast við, at í teimum førum har bert annað hevur foreldramyndugleika eru mammurnar í stórum meiriluta.

Júst tí at sambúgvandi, men ógift foreldur ella fráskild foreldur bæði skulu hava møguleika at taka avgerðir og ávirka uppvøksturin hjá børnunum, og júst tí at so nógvar reglur eru knýttar at hugtakinum foreldramyndugleika, er neyðugt við nýggjari lóggávu á økinum, so tey foreldur, sum ynskja tað kunna tryggja sær síni rættindi og t.d. avtala felags foreldramyndugleika. Lóggáva okkara er ótíðarhóskandi fyri tey nógvu foreldur sum liva saman ógift og fyri tey nógvu foreldur sum skiljast, men sum ynskja sum foreldur at hava rættindi og skyldur mótvegis børnum sínum. Í Føroyum eitur onki felags foreldramyndugleiki.

Til skúlaráðsvalið verður foreldramyndugleiki nýttur sum kriterium fyri valinum, og má tí roknast við rættiliga stórari yvirvág av mammum sum kunnu velja og eru valbarar. Páparnir vera fyri vanbýti. Nógvir av hesum pápum eru sambúgvandi við mammuna og nógvir av teimum fráskildu hava eitt tætt samband við børn síni annars. Eftir eru so teir páparnir, sum ikki hava samband við børn síni yvirhøvur av ymiskum orsøkum, men man tað vera tann minni parturin.

Javnstøðulógin sigur, at mismunur ikki má gerast á fólki orsakað av kyni - hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis. Tá reglur vera gjørdar sum tykjast kynsneutralar, men raka skeivt, soleiðis, at fylgjurnar serliga raka annað kynið, verður gørdur óbeinleiðis kynsmismunur. Tá foreldramyndugleiki verður nýttur sum kriterium og stórur partur av børnunum bert hevur eitt foreldur skrásett sum havandi foreldramyndugleika og roknast má við at tað eru mammurnar, sum eru í stórum meiriluta, eru páparnir fyri vanbýti, og verður tí her gjørt brot á javnstøðulógina.

Leggjast skal aftrat, at tað verður neyvan í bræði um nakrantíð, at foreldur vera heilt javnsett mótvegis børnunum, soleiðis at skilja at ein biologiskur pápi kann krevja ella fáa somu rættindi sum mamman til eitt barn, men lógarreglurnar og eisini javnstøðulógin skulu tulkast út frá teirri tíðini vit liva í og teimum viðurskiftum vit liva undir. Og at reglurnar um foreldramyndugleika sum eru óbroyttar frá 1922 ikki eru nøktandi í dag, ger ikki brotið á javnstøðulógina minni. Javnstøðunevndin heitir tí á landsins fólkavaldu um at syrgja fyri at lógarbroyting verður gjørd á hesum familjurættarliga átroðkandi økinum, so samsvar verður millum lógirnar.

Vegna Javnstøðunevndina

*Turið Debes Hentze, fork.*

## Tórshavnar Kamarkór konsert í Norðurlandahúsinum

**Leygardagin 12. mai kl. 16.00 hevur Tórshavnar Kamarkór konsert í Norðurlandahúsinum. Kórleiðarin Hans Pauli Tórgarð, sum hevur stjórnað kórinum síðani 1999, hevur sett saman eina fjølbroytta skrá við føroyskum og norðurlendskum sangum, umframt nakrar jazz-standards.**

Á konsertini verða eisini framførd nøkur av teimum føroysku løgunum, sum kórið fer at syngja á konsertferð í Svøríki í juni mánaða. Nevnast kunnu verk eftir Sunleif Rasmussen, Paula í Sandagerði, Vagn Holmboe og Kára Bæk.

Kórið hevur tó lagt seg eftir ikki bert at syngja traditionellan kamarkórstónleik, og verða tí eisini onnur forvitnislig verk á skránni. Av jazzstandardum, sum verða at hoyra nú leygardagin, kunnu nevnast It Might As Well Be Spring, When I Fall in Love og When Sonny Gets Blue.

Tórshavnar Kamarkór varð stovnað í 1985. Í løtuni eru umleið 24 sangarar í kórinum, harav tey flestu eru royndir kórsangarar.

Konsertin varar ein knappan tíma, og atgongumerkið kostar 60 kr.

Stuðlar hjá Tórshavnar Kamarkóri eru: Føroya Sparikassi, Mentanargrunnur Landsins, BP Amoco, Mentamálastýrið, Norðurlandahúsið.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.






*Andrias Jacobsen og Áki í Skemmuni tóku stig til stóru fiskivinnustevnuna í Runavík. Mynd: Eyðun Klakstein*

# Veruleikin betri enn hugskotið

**Stigtakararnir til Føroya størstu sølustevnu siga, at undirtøkan fyri stevnuni gjørdist nógv størri, enn teir nakrantíð høvdu roknað við**

NAFF
*Eyðun Klakstein*

Annar arbeiðir sum hjálparfólk, og hin er stjóri í privatari fyritøku. Annar er formaður í ítróttarfelag, meðan hin er virkin vinnulívsmaður.

Saman eru teir tó upprunin til størstu sølustevnuna, sum nakrantíð hevur verið fyriskipað í Føroyum. Talan er sjálvandi um fiskvinnumessuna, North Atlantic Fish Fair, sum verður í Runavík í komandi viku.

– Eg havi skipað fyri onkrum sølustevnum, og fyrrverandi borgarstjórin í Runavík helt, at tað hevði verð gott at gjørt eina fiskivinnustevnu. Hetta hugskotið helt eg vera gott og fór í holt við tað, greiðir Andrias Jacobsen frá.

### Størri enn hugskotið

Hann vendi sær til Áka í Skemmuni, sum er stjóri í Eysturoyar Heilsølu, og teir báðir fóru síðani í holt við at gera hugskotið til veruleika.

– Vit tosaðu við almennar myndugleikar og fyritøkur fyri at finna fram til rætta leistin, og tá vit hildu okkum hava eitt liðugt hugskot, bóðu við Virkisráðgeving snøgga tað til og standa fyri fyrireikingunum, sigur Áki í Skemmuni.

– Hóast vit upprunaliga hugsaðu um eina altjóða fiskivinnustevnu, so hevur undirtøkan fyri stevnuni verið størri, enn vit nakrantíð roknaðu við. Stevnan er í grundini størri enn hugskotið var at byrja við, sigur Áki.

### Stevnan má eydnast

Bæði Andrias og Áki vóna, at fiskivinnumessan verður afturvendandi tiltak í Runavík.

– Hetta er fyrsta stevnan av slíkum slagi, og tí hevur tað so ómetaliga nógv at siga, at alt eydnast væl. Um alt ikki er í lagi, so kunnu vit líka so væl gloyma at endurtaka stevnuna, heldur Áki í Skemmuni.

– Vit kunnu ikki kappast í stødd við aðrar altjóða stevnur av hesum slagi, men vit ætla at kappast í góðsku, og vit hava eisini onkrar fyrimunir fram um aðrar, heldur hann.

Flótandi framsýningin á stevnuni er nakað, sum aðrar líknandi stevnur ikki kunnu bjóða fram.

– Tað hevur gingið óvæntað væl við fyrireikingunum, og nú vóna vit, at alt fer at ganga eftir vild teir dagarnar, tá sjálv stevnan verður.

# Mugu skunda undir góðshavnina í Ánunum

**Klaksvík manglar havnaøki, og tí er neyðugt at skunda undir arbeiðið at gera góðshavnina í Ánunum lidna, heldur formaðurin í havnanevndini hjá Klaksvíkar kommunu**

PLÁSSTROT
*Eyðun Klakstein*



*Virksemið í Klaksvík er nógv økt seinnu árini, og hetta skapar plásstrot á kaiøkinum*

*Klaksvík:* Klaksvíkingar skulu gloyma at gera útbyggingar á vágni og heldur seta ferð á arbeiðið at gera góðshavnina í Ánunum lidna.

Tað heldur Torleif Sigurðsson, sum er formaður í havnanevndini hjá Klaksvíkar kommunu.

– Allar útbyggingar á vágni verða lappaloysnir, meðan nýggja góðshavnin í Ánunum kann geva heilt nýggja møguleikar við havnaøki, sigur Torleif Sigurðsson.

– Klaksvík hevur ikki trot á kaiplássi, men upplandið er ov lítið. Skulu vit hava munandi størri havnaøki er góðshavnin í Ánunum besta loysnin

### Kanska gera felag

Klaksvíkar býráð samtykti herfyri, at útfyllingin í Ánunum skal halda fram, og tá góðshavnin er liðug verður eitt øki upp á 20.000 fermetrar tókt.

Men tað fer at taka nøkur ár at gera hesa góðshavnina lidna, tí hon fer at kosta yvir 30 milliónir, og Klaksvíkar kommuna kann sum er bara brúka nakað undir 20 milliónir til íløgur.

– Vit hava umhugsað at gera eitt partafelag, sum skal standa fyri byggingini av góðshavnini. Hetta kundi verið eitt felag hjá kommununi og fyritøkum í Klaksvík, sigur Torleif Sigurðsson.

– Á hendan hátt kundu vit gjørt góðshavnina skjótari lidna.

### Meiri virksemi

Torleif Sigurðsson heldur, at góðshavnin í Ánunum kundi lætt munandi um trýsti inn á vágni í Klaksvík. Stóru skipini kundu verið avgreidd í Ánunum, og tað hevði beinanvegin givið betri pláss á vesta kaiøki í Klaksvík.

– Vit hava tann positiva trupulleika, at virksemi í Klaksvík er økt nógv seinnu árini, men vit skulu fylgja við, og syrgja fyri, at vit ikki missa virksemi, tí vit ikki klára at byggja býin út, sigur Torleif Sigurðsson.

– Skuldin hjá Klaksvíkar kommunu er so nógv minkað, at nú nærkast hon einari álíknind. Komandi árini fer Klaksvíkar kommuna at fáa størri fíggjarligt rásarúm.


